# Sosialurin

*TV3 Mikudagin kl. 20.00*

## Enough

**Slim er av arbeiðarastættini, og hon starvast sum tænari. Men lív hennara verður koppað á, tá hon verður gift við Mitch. Skjótt livir hon nevnliga sum verulig yvirklassakvinna við øllum tí, sum har til hoyrir. Ikki minst, dóttrini, Gracie. Gleðin verður tó stokkut, tá Slim kemur eftir, at maðurin kortini ikki er so perfektur. Harðligi atburður hansara ger, at hon roynir at rýma, men hetta er trupult. Ikki minst, tí Mitch hevur fólk at hjálpa sær. Tí verður hon eisini funnin, tá nýggja lív hennara so smátt er byrjað, men Slim ætlar sær á ongan hátt heimaftur. Hon hevur fingið nokk.**



Canal+Film1 Fríggjadagin kl. 19.00

### Jay Z – Fade to Black

Í 2003 kunngjørdi hip hop-kongurin-Jay Z, at næsta fløga hansara bleiv tann seinasta. Og til seinastu konsert hansara sang hann fyri einum útseldum Madison Square Gareden. Í hesum dokumentarfilminum lítur Jay Z aftur á lívið og yrkisleiðina. Ikki minst við seinastu konsertini í huga.



3+ Týsdagin kl. 20.00

### Red Corner

Í Kina verður ein ósekur amerikanskur borgari skuldsettur fyri at hava myrt eina kinverska fotomodel. Maðurin – spældur av Richard Gere – upplivur ringastu marru sína, tá hann noyðist at staðfesta, at tað snøgt er ógjørligt at sleppa úr kinversku rættarskipanini. Einasti møguleiki hansara er ein kvinnuligur kinverskur advokatur, men heldur ikki hon heldur, at hann sigur sannleikan.



DR2 Mánadagin kl. 19.50

### Stasi – Af kærlighed til folket

Í 20 ár starvaðist harra S sum embætismaður og tænti samfelagnum. Af kærleika. Tá tíðirnar skiftu, og múrurin fall, fall tilveran hjá S eisini sundur. Einsamallur á skrivstovu síni gav hann eina frágreiðing um starv sítt. Um 20 ár, har hann tænti Stasi fregnartænastuni. Vitnisburðurin hjá S saman við dokumentatión úr bæði almennum og privatum goymslum er grundarlagið undir hesum dokumentarfilminum.

Televarpið

Fleiri rásir – einki roks

# VARPIÐ

F R Í G G J A D A G U R 5 . J A N U A R 2 0 0 7

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**